## Bardagar í Guinea

Minst 58 fólk eru deyð í ógvusligum samanbrestum millum mótmælisfólk og trygdardeildir í Guinea. Ófriðurin kyknaði, tá fleiri túsund mótmælisfólk komu saman uttan fyri ítróttarvøllin í høvuðsstaðnum Conakry, har tey mótmæltu hernaðarstýrinum. Tíðindastovan AP skrivar, at umleið 50.000 fólk vóru við í tiltakinum, og at mong teirra bóru skelti, sum kravdu demokrati. Fleiri mótmælisfólk vórðu tikin, og tað ljóðar, at fleiri andstøðuleiðarar og tíðindafólk eru eisini tikin.



## Kallaði Obama brúnan

Italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, er aftur vorðin umrøðuevni í fjølmiðlunum. Orsøkin er, at hann hevur umrøtt amerikanska forsetan, Barack Obama, sum »brúnan«. Tað gjørdi hann eisini eina ferð í fjør, og hóast hann fekk hvassar ábreiðslur tá, brúkti hann sama orðið á fundinum í Milano um vikuskiftið. Hesaferð fór hann eitt sindur longur og umrøddi eisini konu forsetans, Michelle Obama, sum "brúna". Italsku fjølmiðlarnir skriva, at Berlusconi bleiv fagnaður við rungandi lógvabrestum á floksfundinum, tá hann tosaði um amerikonsku forsetahjúnini.



*Liselotte Lyngsø helt ein spennandi og áhugaverdan fyrilestur á vinnudegnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Skulu útnytta tað serliga føroyska

**Kenda danska vinnulívskvinnan, Liselotte Lyngsø, helt fyrilestur á vinnudegnum, sum hon nevndi Innovation i krisetider. Hon sigur, at vit skulu útnytta okkara serliga kennskap til veður og vind**

FYRILESTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var týðiligt, at Liselotte Lyngsø er á heimavølli, tá tað um fyrilestrar ræður.

- Tað ræður um serliga, at kunna venda trupulleikum til fyrimunir. Í hesum krepputíðum, sum Føroyar ikki eru so hart raktar av, ræður um at gera sær dælt av lítlu støddini, Føroyar hava. Eitt annað, sum er serligt við tykkum er fosturlandskærleikin og evnini at standa saman. Og tað hóast fólk fara av landinum at útbúgva seg ella arbeiða, og tað skulu tit útnytta, eins og ein guerrilla-rørsla, sum kann seta eina rúgvu í gongd, sigur Liselotte Lyngsø.

Hon sigur, at føroyingar kenna hvønn annan sera væl og stuðla hvørjum øðrum. Børn okkara spæla saman, og alt tað er ein framúr fyrimunur.

- Nú havi eg roynt at lent her fleiri ferðir, og tað hevur miseydnast. Har verður neyðugt at gera nakað. Men tykkara virtuella ella tøkniliga infrastrukturi feilar einki, so í staðin fyri at tvíhalda um føroyingar her á landi, skulu tit lata tey fara, men syrgja fyri at útnytta tað tilfeingi til at skapa førleikar og seta nýggjar fyritøkur á stovn, sigur Liselotte Lyngsø.

**Finna røttu skipanina**

Í dag ræður ikki so nógv um at eiga tilfeingið, men heldur at hava atgngd til tað, og at kunna útnytta tað í stig við at nýggjur tørvur skapast.

- Eitt nú tykkara oljufelag, sum er eitt talandi dømi. Tey hava skapt eina handilsskrá, sum gongur út upp á júst at vera lítil og koma inn og gera sær dælt av oljufundum, sum tey stóru oljufeløgini ikki tíma at fáast við. Tað eru slíkir møguleikar, tit skulu gagnnýta. Eg kalli tað at vera tann lítli snýtarin, sum fer inn har, sum tey stóru hava valt frá. Har kunnu tit skapa vøkstur, tí tit eru lítil og fleksibul, sigur Liselotte Lyngsø.

Hava Føroyar so havt ávirkan á donsku vinnulívskvinnuna?

- Eg má sita, at tað kann ikki umgangast at tykkara villa veður hevur ávirkað meg. Eg sat allan dagin í gjár uppi í Íslandi, og seinast eg var í Føroyum endaði eg í Stavanger, og eina aðru ferð kom eg als ikki fram.So tað umgongst ikki, at man kemur at kenna tykkum og lærir, hvar tykkara styrki liggur, sigur Liselotte Lyngsø.

Hon sigur, at vit skulu útnytta kennskapin til veður og vind, so vit kunnu framleiða nakað, vit kunnu útflyta, júst tí vit eru so útsett, sum vit eru og hava kennskap til nakað, onnur vita lítið og einki um.